[2. umfar]
føðingardagskapping hjá SMS
Vinningar fyri meira enn 30.000 kr.

MIKLAGARÐUR GÁVUKORT 5.000 kr.

**Høvuðsvinningarnir eru trý gávukort á kr. 5.000,00 frá Miklagarði.**

Finn tey 6 tilboðini í blaðnum, sum eru merkt við einum bókstavi. Set síðan teir 6 bókstavirnar saman til lyklaorðið hesa vikuna.

Stóra føðingardagskappingin í SMS

**HVØRJA VIKU** luta vit burtur 1 gávukort á 1.000,00 frá Glasstovuni, 2 gávukort á 1.000,00 og 6 gávukort á 500,00 frá handlum í SMS

**Hesa vikuna eru gávukortini frá:**
Kr. 1.000,00: Demmus og Klivin
Kr. 500,00: Bókasølan, Flykran, Heilsa, Mango, Sportmaster og Vero Moda

Leygardagin 15. november draga vit lut um teir tríggjar stóru høvuðsvinningarnar, sum eru trý gávukort á 5.000,00. Luttekur tú allar vikurnar, hevur tú tríggjar møguleikar at vinna høvuðsvinningin.

Fyll út niðanfyristandandi ringar við rætta loyniorðinum og koyr seðilin í svarkassan í ein av handlunum í SMS ella send hann til **SMF, Postboks 1059, 110 Tórshavn**, viðmerk brævbjálvan: "Føðingardagskapping".

**Hvør upptraðkar í SMS hesa vikuna í sambandi við føðingardagin?**

**Sent inn hevur:**
Navn:
Bústaður:
Bygd/Býur
Telefon:

Fyri at luttaka í kappingini um vinningarnar hesa vikuna, skal svarlepin verða okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 8. november 2003. Vinnararnir fáa beinleiðis boð. Vinningarnir kunnu ikki býtast um til reiðan pening. Starvsfólk í SMS og á Hotel Føroyum kunna ikki luttaka í kappingini.

**8** sms blaðið



LUTAKAST HESA VIKUNA:

1x 1.000 kr. Gávukort frá Glasstovuni

2x 1.000 kr. Gávukort frá Demmusi og Klivanum

6x 500 kr. Gávukort frá Bókasølan, Flykran, Heilsa, Mango, Sportmaster og Vero Moda

MIKLAGARÐUR GLASSTOVAN The Favourite Restaurant
SMS • TEL. 31 48 88 HEILSA VERO MODA mango SPORTMASTER
SMS DEMMUS Klivin Flykran Bókasølan

ítróttur
Nr. 209 • týsdagur • 4. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú kemur eygleiðaraskipanin



*Frank Snit og Eyðun Sameulsen eygleiða her dømingina í kvinnudystinum í Vestmanna sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Dómarafelagið er nú formliga sett á stovn, og eitt av fyrstu stigunum verður at seta eygleiðaraskipan í verk**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at talan hevði verið um tos í fleiri ár, gjørdu føroysku hondbóltsdómararnir í fjør álvara av at seta egið felag á stovn. Hetta var um sama mundi, sum steypafinalan í vár varð leikt, tá allir dómararnir høvdu sett hvørjum øðrum stevnu, og har var semja um, hvussu farast skuldi fram.

Um vikuskiftið var so formliga stovnanin av felagnum, og longu nú tykist greitt, at nøkur greið mál eru sett í kortið.

## Royndir menn skulu hjálpa

Umframt sjálva stovnina av felagnum, so varð vikuskiftið eisini nýtt til dómaraskeið, har danin, Frank Snit, var skeiðhaldari. Hesin Frank Smit er fyrrverandi makkarin hjá Peter Lorentzen, sum nú dømir altjóða dystir saman við okkara egna Kristian Johansen, og heilt fram til í fjør var hann sostatt virkin IHF-dómari.

Umframt skeiðið – har øll fyrstu deildar pørini tóku lut – var avgerð undan hesum tikin um, at Frank Snit skuldi hjálpa til við at seta eina eygleiðaraskipan á stovn.

Í fyrstu atløgu vera tað teir tríggir, Hans Holm, Eyðun Samuelsen og Hjalmar Petersen, sum koma at virka í hesari, og saman við teimum trimum hugdi Frank at dystunum hjá føroyska landsliðnum móti Team Helsinge hós- og fríggjakvøldið. Og hartil var hann saman við Eyðuni Samuelsen til dystin í Vestmanna sunnudagin, tá kvinnuliðini hjá VÍF og Neistanum leiktu.

Teir tríggir nýggju eygleiðararnir hava allir royndir sum dómarar í Føroyum, og fyri dømingina er einki at ivast í, at ein slík skipan kann vera til stórt gagn. Hans Holm hevur umframt aktiva leiklutin sum dómari ígjøgnum nógv ár eisini verið partur av nevndararbeiðinum í HSF í langa tíð. Hjalmar var fram til fyrraárið partur av einasta altjóða dómaraparinum hjá okkum, inntil borgarliga starvið legði ov stórar forðingar fyri. Og Eyðun Samuelsen hevur hóast unga aldurin drúgvar royndir sum dómari í bestu deildini.

Allir búgva teir í Havn, men hóast tað í nøkrum førum kann verða ein vansi, so merkir hetta í fyrstu atløgu, at kostnaðurin av skipanini kann haldast á einum lágum støði, tí føroyska kappingin í dag er vorðin somikið miðsavnað, at nógv teir flestu dystirnir verða leiktir í høvuðsstaðnum.

## Góð ráð

Kristian Johansen, sum í dag má metast sum »the grand old man« millum aktivu dómararnar, er eisini sera fegin um hetta, og sjálvur ivast hann ikki, at hetta kann tilføra dómarunum nógv gott.

- At byrja við verður tað ikki soleiðis, at dómararnir beinleiðis fáa karakter fyri avrikini. Heldur hava vit valt, at eygleiðararnir kunnu hjálpa dómarunum við nøkrum lutum, sum eru avtalaðir frammanundan. Eitt nú plaseringar á vøllinum, rennibanar við meira. Sum dómari situr tú ofta og eygleiðir dystin við heilt øðrum eygum, og fyri okkum, sum døma, er einki at ivast í, at tað er til størri hjálp, um ráðini koma frá hesum, heldur enn sum skot frá onkrum ónøgdum áskoðara, heldur Kristian.

## Fleiri altjóða uppgávur

Fyri knøppum ári síðani skrivaðu vit her í blaðnum, at Kristian Johansen hevði fingið danska Peter Lorentzen sum makkara í altjóða dømingini. Vanligi makkarin hjá Kristiani undan hesum, Hjalmar Petersen, er jú ikki aktivur sum dómari longur, og sum tað framgongur aðra staðni her á síðuni, so er fyrrverandi makkarin hjá Peter eisini givin sum dómari.

Eftir einstakar uppgávur hjá nýggja parinum, er nú líkt til, at verulig ferð er komin á dømingina hjá teimum báðum. Í august mánaði vóru teir við í eini kapping í Danmark, har teir innan tríggjar dagar dømdu ikki færri enn átta dystir. Fyri trimum vikum síðani vóru teir so í Luxemburg, har tveir dystir í øðrum umfari av Europa-Cup kappingini vóru á skránni, og her gekst teimum heilt væl.

Somikið væl, at teir nú aftur hava fingið boð um at døma í triðja umfarinum av Europa-Cup. Talan verður um dyst í Svøríki, har Halmstad tekur ímóti íslendska Kópavági, og verður tann dysturin nú leygardagin, komandi.

**-jm**